


**Vika 17 – 24. apríl**
Vinnaratøl: **03 - 05 - 15 - 20 - 32 - 43**

Eykatøl: **24 - 48**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **Eingin vinnari** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **358.910,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **3.618,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **130,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **40,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
Tlf. 213212




fæst á apotekunum kring landið




BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

## KROSSORÐ




### Vinnari:

*Jóna Johannessen*
*Eirargarður 8-101*
*100 Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: YVIRGANGUR



**Hvønn fríggjadag**
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. ...« á bjálvan.

Loysunar-orðið: ........................................ **299**

Navn: ........................................................

Bústaður: ..................................................

Bygd/býur: ................................................

***Lesið føroyskt –hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ❑ **Úti á leysum oyggjum** - *Marianna Debes Dahl*
- ❑ **Matur í myndum** - *Sigrid Dalsgaard/ Beinta Johannesen*
- ❑ **Í skýmingini** - *Sofía Petersen/Elinborg Lützen*
- ❑ **Meistarin og teir fýra skrivararnir** - *Ulf Nilsson/Karl N. Hansen týddi*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ❑ **Málløra** - *Paulivar Andreasen/Árni Dahl*
- ❑ **Rura** - *Þóra Þóroddsdóttir*
- ❑ **Føroya jarðfrøði** - *Jóannes Rasmussen*
- ❑ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ❑ **Fólk og mentan** - *Jóan Pauli Joensen*

***Bøkur og annað tilfar –bæði innan og uttan skúlagátt***

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**




Fríggjadagin 26.04. kl. 21:15
Fríggjadagin 26.04. kl. 23:30
Leygardagin 27.04. kl. 21:15
Leygardagin 27.04. kl. 23:30
Sunnudagin 28.04. kl. 20:15
Sunnudagin 28.04. kl. 22:30




Fríggjadagin 26.04. kl. 18:30
Fríggjadagin 26.04. kl. 23:00
Leygardagin 27.04. kl. 18:30
Leygardagin 27.04. kl. 23:00
Sunnudagin 28.04. kl. 17:30
Sunnudagin 28.04. kl. 22:00




Fríggjadagin 26.04. kl. 18:45
Leygardagin 27.04. kl. 18:45
Sunnudagin 28.04. kl. 17:45




Fríggjadagin 26.04. kl. 20:45
Leygardagin 27.04. kl. 20:45
Sunnudagin 28.04. kl. 19:45

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**



Búskapur og vinna:

## Stríð um trolarar

Russiska stjórnin hevur nú lovað at gera sítt til at loysa trupulleikarnar, sum Ørskov skipasmiðjan í Frederikshavn er komin í, tí russar hava ikki verið førir fyri at gjalda nakrar trolarar, sum hon hevur bygt fyri russar. Málið er upprunaliga frá 1995 og hevur drigið út hóast fleiri royndir at loysa tað, og í vikuni samdust Anders Fogh Rasmussen og russiski forsætisráðharrin, Mikhail M. Kasjanov, um at fáa málið loyst.

Leiðslan á donsku skipasmiðjuni sigur, at teir vantandi pengarnir úr Russlandi vóru orsøkin til, at hon noyddist at senda 350 av sínum arbeiðsmonnum til hús, og leiðslan hevur boðað frá, at fær hon ikk pengarnar, missa 200 menn afturat arbeiðið.

Mikhail M. Kasjanov segði týsdagin í Keypmannahavn, at hetta málið eigur at fáa eina loysn, og hann lovaði at kanna møguleikarnar, á hann kom aftur til Moskva.

## Aftur kreppa

Búskapartrupulleikarnir í Argentina tykjast ongan enda taka, og nú er vandi fyri, at kreppan fer at kosta einari stjórn afturat tilveruna.

Týskvøldið boðaði búskaparráðharrin frá, at hann legði frá sær, eftir at tað var vorðið greitt, at eitt av hansara kreppuuppskotum fekk ikki ta neyðugu undirtøkuna. Ráðharrin hevði mælt til at binda innlánini hjá fólki í almenn virðisbrøv fyri at forða fyri, at bankarnir skulu fara á húsagang.

Stjórnin var so vís í at fáa uppskotið samtykt, at hon gjørdi av at steingja bankarnar, til uppskotið kundi koma í gildi sum lóg, men tað vísti seg, at tað lóggevandi tingið sýtti fyri at taka undir við uppskotinum. Tá tað varð greitt, gjørdi búskaparráðharrin av at leggja frá sær. Samstundis kravdu mótmælisfólk, at øll stjórnin skuldi fara frá.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Chirac savnar høgravongin ímóti Le Pen

**Í seinna umfari av valstríðnum hevur Jacques Chirac lagt seg eftir at savna veljarar á høgravonginum ímóti tí víðgongda Jean-Marie Le Pen**

FRAKLAND
*Árni Joensen*

Líka síðani fyrra umfarið seinasta sunnudag hevur sitandi forsetin, Jacques Chirac, gjørt greitt, at hann ætlar sær ikki í nakran persónligan dyst við mótvalevnið, tann sera víðgongda høgramannin Jean-Marie Le Pen. Tvørturímóti ætlar hann at reka eitt siðiligt valstríð, men eingin skal kortini vera í minsta iva um, hvat hann heldur um mótstøðumannin.

M. a. hevur Chirac sýtt fyri at taka lut í einum sjónvarpsorðaskifti við Le Pen. Sjálvur segði hann, at tað ber ikki til at skifta orð um hatur, og at eitt orðaskifti við Le Pen hevði lagt ein óhugnaligan dám á valstríðið. Le Pen var skjótur at svara og kallaði Chirac ein ræðuskít, sum hevði sýtt fyri at skifta orð við eitt mótvalevnið, sum fólkið hevur valt.

Eygleiðarar í París ivast í, hvussu skilagott tað var av Chirac at sýta fyri at dystast við Le Pen í sjónvarpinum. Teir halda, at avgerðin fer at kosta forsetanum atkvøður, og meiningakanningar mitt í vikuni vístu eisini, at 70 prosent av teimum spurdu hildu, at forsetin átti at tikið av avbjóðingini og tikið dystin upp.




*Nei! Mótstøðufólk hjá tí sera høgravenda Jean-Marie Le Pen vísa, hvat tey halda um hann. Síðani valið hava allir flokkar bæði til høgru og vinstru í fronskum politikki boðað frá, at teir vilja einki hava við Le Pen og flokk hansara, Front National, at gera*

### Borgarlig eind

Franskir eygleiðarar siga, at seinna valumfarið er í ferð við at líkjast einari fólkaatkvøðu fyri ella ímóti flokkinum hjá Le Pen, Front National, og teimum víðgongdu sjónarmiðunum, sum flokkurin hevur um eitt nú tey fremmandu í Fraklandi. Allir aðrir flokkar bæði til høgru og vinstru í fronskum politikki hava gjørt greitt, at teir fara undir ongum umstøðum at samstarva við Front National ella Jean-Marie Le Pen.

At úrslitið av tí seinna valumfarinum longu tykist greitt hevur havt við sær, at flokkarnir heldur eru farnir at hugsa um tjóðartingsvalið, sum verður í næstum, og orðaskiftið snýr seg um, hvussu flokkarnir skulu bera seg at fyri at steðga framgongdini hjá Le Pen. Á tjóðartingsvalinum í 1997 eydnaðist tað valevnum hjá Front National at røkka til seinna valumfarið í 76 valdømum, og tað eydnaðist flokkinum at vinna í einum valdømi í miðjarðarhavsbýnum Toulon. Í 1997 sást týðiliga, at Front National tók veljarar frá hinum høgraflokkunum, og flokkurin var tí óbeinleiðis orsøkin til, at Jacques Chirac misti meirilutan í tjóðartinginum.

Eygleiðarar vænta, at Front National kann fáa umleið 12 prosent av atkvøðunum í fyrra umfari av tjóðartingsvalinum í juni, og at valevni hjá flokkinum fara at halda fram í seinna umfari í 319 av teimum 566 valdømunum. Flokkurin fær tó neyvan meiri enn 10 tinglimir, tá saman um kemur, men tað kann verða nóg mikið til at órógva teir hóvligu borgarligu flokkarnar, sum miðja eftir at fáa eitt úrslit, sum kann bera í sær, at bæði forsetin og forsætisráðharrin verða borgarligir. Seinastu fimm árini hevur Frakland havt borgarligan forseta og sosialistiskan forsætisráðharra, og tað hevur sambært teimum borgarligu flokkunum als ikki riggað.

Tí taka teir flestu borgarligu flokkarnir undir við einum hugskoti hjá Chirac um at savna tær borgarligu kreftirnar, soleiðis at flokkarnir stilla upp felags valevni í øllum valdømum. Á tann hátt slepst undan, at borgarligar atkvøður fara til spillis. Higartil hava nýgaullistarnir RPR, fleiri liberalir flokkar og tann borgarligi miðflokkurin UDF tikið undir við hugskotinum.

Úr Norðurlondum:

## Funnu gamalt skip

Menn, sum gróvu á einum parkeringsplássi í Tróndheimi í Noregi, komu nú um dagarnar fram á leivdirnar av einum skipi, sum sambært teimum kønu stavar frá 17. ella 18. øld.

Jens Rytter, fornfrøðingur sigur, at kommunan hevur fingið boð um at steðga grevstrararbeiðinum, tí fornfrøðingar ætla sær í næstu viku at kanna, hvussu gamalt skipið undir parkeringsplássinum veruliga er. Sambært Jens Rytter er skipið smíðað úr furu, og tað bendir á, at talan er um eitt norskt skip, sigur hann.

Fornfrøðingurin sigur, fundið í Tróndheimi er sera áhugavert.

## Smugla fólk um Oyrasund

Løgreglumyndugleikarnir í Danmark og Svøríki hava avdúkað eina roynd at smugla fólk eftir brúnni um Oyrasund. Tilburðurin var mánadagin, tá svenska løgreglan steðgaði einum lítlum bussi, sum var komin um brúnna úr Danmark. Tað vísti seg, at 19 flóttafólk lógu stúgvað saman í bussinum. Sambært svensku løgregluni var tann lítli bussurin so fullur, at nøkur fólk mundu dottið úr honum, tá løgreglumenninir lótu hurðina upp.

Svenska løgreglan sigur, at tey flestu høvdu rumenskt pass. Tey hava greitt frá, at tey vóru komin til Danmarkar við einum fullfermdum lastbili. Har vórðu tey býtt sundur í minni bólkar, áðrenn tey leitaðu sær víðari til Svøríkis.

Maðurin, sum koyrdi tann lítla bussin, er nú skuldsettur fyri mannasmugling. Svensku myndugleikarnir meta, at umleið 15.000 fólk royna at koma sær ólógliga til Svøríkis um árið.